# Vest Norden ikki bara miseydnað

**Nógv hevur verið frammi í miðlunum um, at árliga ferðavinnustevnan, Vest Norden Travel Mart, sum herfyri var í Keypmannahavn, var miseydnað sæð við føroyskum eygum, men tað haldi ikki allir partar av føroysku ferðavinnuni**

FERÐAVINNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Marni Hjallnafoss, stjóri á Green Gate Incoming, heldur ikki, at Vest Norden Travel Mart bara var miseydnað í ár. Hann heldur, at føroyska ferðavinnan eigur at hugsa meiri rationelt.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ein av teimum, sum hevur tikið lut á flestøllum Vest Norden Travel Mart seinastu mongu árini, er Marni Hjallnafoss, stjóri á Green Gate Incoming. Hann heldur ikki, at Travel Mart var so miseydnað, sum fleiri vilja verða við.

### Fingu nógv burturúr

Marni Hjallnafoss sigur, at á Green Gate eru tey væl nøgd við tað, sum tey fingu burtur úr í ár.

- Vit fingu tað, sum vit fóru eftir. Eg haldi tó, at ein trupulleiki var tað, at tað vóru so óvanliga nógvir føroyskir luttakarar á stevnuni í ár, sigur Marni Hjallnafoss.

- Teir smáu veitararnir eru kanska ikki so sjónligir sum teir stóru. Harafturat fara keypararnir fyrst og fremst at vitja tey, sum eru afturvendandi luttakarar á Vest Norden Travel Mart, sigur Marni Hjallnafoss.

Eg skilji væl tær frustratiónir, sum eru, men tað sum vit hava upplivað í miðlunum, síðani vit komu heim, haldi eg verða ov nógv av tí góða. Gamaní vóru tað summi ting, sum ikki vóru nøktandi, so sum plasering og kunning undan stevnuni, men vit skulu minnast til, at hetta var fyrstu ferð, at stevnan var í Danmark, og tí vilja tað altíð verða summir trupulleikar, sigur Marni Hjallnafoss.

Hann leggur tó eisini dent á, at øll tiltøkini í sambandi við ferðavinnustevnuna riggaðu væl, og tað eiga fyrireikararnir rós fyri.

### Óvanliga stór føroysk luttøka

Stjórin á Green Gate Incoming heldur, at smærru hjáveitararnir í føroysku ferðavinnuni høvdu fingið meiri burtur úr við at brúka pengar uppá okkurt annað enn at senda umboð á Vest Norden Travel Mart.

- Vit selja teirra vøru, og tí hevði tað kanska verið snildari, um tey lótu operatørarnir umboða teirra vøru, og ístaðin nýttu pengingin á annan hátt á Travel Mart. Hetta merkir so avgjørt ikki, at tey onki hava at siga, tí vit kunnu ikki verða tey fyriuttan, tí tað eru teirra produktir, ið vit selja. Vit hava ongantíð áður havt so stóra umboðan úr Føroyum, og vit noyðast at hugsa meiri rationelt, sigur Marni Hjallnafoss.

Hann heldur tað verða umráðandi, at partarnir í føroysku ferðavinnuni læra at tosa meiri saman undan slíkum ferðavinnustevnum, so at man í best møguligan mun fær fyrireika seg til stevnuna allari vinnuna at frama.

- Eg haldi, at rætti vegurin fram er, at teir størru veitararnir, t.d. flutningsfeløgini, túroperatørar og umboð fyri kunningarstovurnar, sum selja produktini hjá teimum smærru hjáveitarunum, umboða vinnuna, tí tað er fyrst og fremst teir, ið kundin velur at vitja, sigur hann.

# Ítróttarkafé og diskotek

**Í dag letur ein sonevnd ítróttarkafé í Havn, sum samstundis eisini verður eitt diskotek. Staðið hevur fingið navnið Cippo og fer at halda til í hølunum undir matstovuni Rio Bravo í Tórsgøtu**

BÝARLÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú verður fyri fyrstu ferð møguligt at fara á eina sonevnda ítróttarkafé í Havn. Tað er Rúni Djurhuus, sum í dag letur upp eina slíka í hjartanum av Havnini. Rúni er útbúgvin kokkur, og hann fer sjálvur at standa og matgera í kaféini. Harafturat fer ein annar útbúgvin kokkur at arbeiða á nýggju ítróttarkaféini.

### Poolborð, airhockey og fótbóltsborð

At talan er um eina ítróttarkafé merkir, at møguleiki verður fyri at spæla eitt nú pool, airhockey og fótbóltsspæl. Somuleiðis fer regluliga at verða møguligt at síggja fótbóltsdystir uttan úr heimi á stórskíggja á kaféini, sum hevur ognað sær ikki minni enn tveir stórskíggjar.

Rúni Djurhuus sigur, at hann er ógvuliga spentur upp á at lata upp, og hann vónar, at tað fer at bera til at hava eitt slíkt stað í høvuðsstaðnum, tí allastaðnis kring okkum ber tað til.

Umframt ítróttarkaféina verður, sum áðurnevnt, eisini diskotek hvørt frígjakvøld og leygarkvøld.

Diskotekið fer at hava 21 ára aldursmark, og Rúni Djurhuus sigur, at nógv góð tilboð verða javnan at fáa bæði í diskotekinum og á kaféini.


SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

## Stjóri til Framtaksgrunn Føroya

Fyri Framtaksgrunnin verður søkt eftir stjóra at byrja skjótast til ber.

**Um Framtaksgrunnin**

Framtaksgrunnur Føroya er ein vinnurekandi grunnur, hvørs virksemi fevnir um at gera íløgur í nýggj ella víðkað vinnutiltøk í Føroyum. Íløgurnar skulu hava eitt langsiktað kapitalavkast, ið stendur mát við váðan. Eisini leggur Framtaksgrunnurin dent á verkætlanir við høgum vitanarinnihaldi.

Framtaksgrunnurin er í løtuni partaeigari í 15 føroyskum fyritøkum.

Framtaksgrunnurin verður stjórnaður av einari fimm-mannanevnd, harav teir fýra verða valdir av Føroya Landsstýri. Fimti nevndarlimurin verður valdur av teimum sitandi limunum.

**Starvið**

Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Framtaksgrunni Føroya við tilvísing til nevndina.

Stjórin skal í neyvum samstarvi við nevndina hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni av rakstri grunnsins, herundir viðgera íløguumsóknir umframt røkta verandi íløgur.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til roknskap og fíggjarviðurskifti
- hevur hollan kunnleika til vinnu- og búskaparlig viðurskifti í Føroyum
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni

**Umsóknir**

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f í seinasta lagi 10. oktober 2005.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 45 ella 54 34 45.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

TEAM85